Føroyar, tí teir komu at hava brúk fyri einum navigatøri. Gamli skiparin, Gunnar Danielsen, hevði arbeitt fyri skipasýnið, men skuldi leggja frá sær.

Hetta var funnin fressur. At koma til Føroyar og so at arbeiða á landi var tað besta, sum kundi henda. Her koma Óla Hendrik at arbeiða frá 1959-1997, ella nærum 40 ár. Teir, sum tá arbeiddu har, vóru ein danskur leiðari, Sofus Sivertsen, Petur Djurhuus, Johan Djurhuus og Børge Persson. Tá ið danin fór, gjørdist Sofus leiðari. Her dámdi Óla Hendrik sera væl, tí arbeiðið var so fjølbroytt. Eina ferð fingu tey bæði møguleika at fara niður aftur í 3-4 mánaðir í arbeiðsørindum. Tá búðu tey hjá beiggjanum Brynleif í Thorsgade á Nørrebro. Hann fyrireikaði seg tá at fara til Føroya, har hann fekk avrikað sítt lívsverk Zarepta.


*Á yngrum árum saman við børnunum frá vinstru: Maud, Dorrit, Hans og Eimy*

## Hevur verið álitismaður

Óla Hendrik og Edith bygdu sær hús úti á Fløtum, sum eisini gjørdist teirra eftirnavn. Her liggur væl fyri at fáast við jørð, seyð, dunnur og gæs. Óla Hendrik er so raskur at velta, at hann hevur átt størstu eplaveltu í Havn, og hevur eisini kunnað forsýnað umframt seg sjálvan øll børnini við eplum.

Óla Hendrik er sera familjukærur. Sum elstur av systkjunum hevur hann altíð havt umsorgan fyri teimum. Hetta hevur sjálvsagt ikki verið minni galdandi fyri børnini. Tað verður tikið til, hvussu væl tað er millum tey bæði gomlu og barnabørnini. Her er einki sum eitur genarationsgjógv. Henda umsorgan umfatar eisini onnur. Vit hitta tey ikki, at tey ikki spyrja eftir børnum okkara og verforeldrunum.

Óla Hendrik hevur stóran áhuga fyri list. Tað, sum hann keypir, og ikki hevur pláss fyri sjálvur, letur hann børnunum at hanga upp.

Hann er ógvuliga fjølbroyttur. Óla Hendrik hevur stríðst við at varðveita Kyrjastein sum eitt minni í Fuglafirði, hann hevur havt sítt egna uppskot um flogvøll, og hann var frammanfyri sína tíð, tá talan var um at byggja blokkar við íbúðum.

Tey bæði hava verið virkin í Brøðrasamkomuni. Óla Hendrik serliga í Kristniboðsambandinum. Á trøðni hevur hann umbygt eitt gamalt fjós, sum nú er høvuðsstøð fyri hetta virksemi. Óla Hendrik hevur fult álit á, at ungdómurin dugur at fara um, og hetta álit verður heldur ikki svikið. Samanumtikið kann sigast at hann er ein álitismaður, sum eisini hevur álit á onnur.

Samstundis hevur Edith verið serliga virkin í køkinum á Zarepta, og tað er ikki tal á øllum teimum munnum, hon hevur verið við til at metta.

Tey bæði fingu børnini Hans, Eimy og Maud, sum eru fødd í Danmark. Í Føroyum er Dorrit komin afturat. Øll børnini búgva í Havn.

Barnabørnini eru 10 og langommu og -abbabørnini eru 8.

Vit ynskja teimum báðum hjartaliga tillukku. Tey bæði hava nevniliga føðingardag dag um dag.

**ó.**


DEN KONGELIGE GRØNLANDSKE HANDEL

vil gerne præsentere sit nye grønlandsskib, m/s »Hans Hedtoft«

I denne anledning indbyder Handelen herved
Overstyrmand O. H. Hansen
lørdag den 3. januar kl. 12.00
til at bese skibet og deltage i en frokost.

Skibet ligger ved Den kongelige grønlandske Handels plads.

Daglig påklædning

*Innbjóðingin til framsýningina av Hans Hedtoft*


*Her er Kaskelot í ferð við ta søguligu flytingina av íbúgvarunum í Thule í 1953. Óla Hendrik sæst við kasjetti*


*Her er Kaskelot komin til nýggja búplássið, og teir eru við at skipa byggitilfar í land*